# Almannamálaráðið

**Lógartænastan**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 12. november 2019 |
| Mál nr.: | 19/00454-10 |
| Málsviðgjørt: | EM |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Kunngerð um broyting í bekendtgørelse om behandling af faderskabssager m.v.

(Váttan av faðirskapi)

### § 1

Í bekendtgørelse nr. 7 af 14. januar 1961 om behandling af faderskabssager m.v., som sat i kraft ved bekendtgørelse nr. 368 af 30. november 1962 og sum broytt við kunngerð nr. 105 frá 23. juli 2018, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 5, stk. 1, 2 og 3 verða orðað soleiðis:
"*Stk. 1.* Familjufyrisitingin tryggjar, at faðirskapurin verður staðfestur.
*Stk. 2.* Familjufyrisitingin kann staðfesta faðirskapin eftir at hava móttikið eina skrivliga váttan sambært § 11, stk. 1 í lov om børns retsstilling. Metir Familjufyrisitingin tað vera ivingarsamt, um pápin, ið er skotin upp sum pápin, og sum ynskir at vátta faðirskapin, í roynd og veru er pápi at barninum, kann Familjufyrisitingin kalla viðkomandi til ein fund, áðrenn støða verður tikin til váttanina.
*Stk. 3.* Faðirskaðurin verður váttaður við, at fráboðaði pápin útfyllir eitt oyðublað, sum er góðkent av Almannamálaráðnum. Familjufyrisitingini áteknar oyðublaðið um váttan av faðirskapinum."

**2.** Í § 5 verður sum stk. 4 og 5 sett:
"*Stk. 4.* Undirskriftin hjá fráboðaða pápanum verður váttað av einum advokati ella tveimum sannanarvitnum uttan so, at fráboðaði pápin møtir persónliga á Familjufyrisitingini at undirskriva oyðublaðið."

**3.** § 6, stk. 1, 1. pkt. verður strikað.

**4.** § 6, stk. 2 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Er fráboðaði pápin undir 18 ár, krevst samtykki frá verjanum til at viðurkenna faðirskapin. Samtykki verður givið skrivliga á oyðublaðið, sum er nevnt í § 5, stk. 3. Verður verjumálið útint av foreldrunum í felag, og samtykki ikki fæst frá einum av foreldrunum hóast áheitan, er nóg mikið við samtykki frá hinum foreldrinum."

**5.** § 6, stk. 3 verður strikað.

**6.** § 10, stk. 1, 1. pkt. verður orðað soleiðis:
*"Stk. 1.* Avgerð um gjald sambært kapittul 2 og 3 í lógini verður tikin av Familjufyrisitingini á tí staðnum, har viðkomandi, sum verður søktur eftir gjaldi ella hevur skyldu til at rinda gjaldið, býr ella uppiheldur sær."

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almannamálaráðið, 12. november 2019

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
landsstýrismaður

/ Eyðun Mohr Hansen

**Skjal 1**

# Heitið á skjalinum